# Nýggi verturin vil stuðla felagssangmentanini



**Eftir at Janus Mohr í mong ár hevur myndað sendingina Føroyskir Sangir í Útvarpinum, hevur Zacharias Sørensen nú átikið sær leiklutin sum vertur. Hann ivaðist ikki, tá hann varð spurdur, og hann fylgir leistinum, sum hevur eyðkent sendingina, men tó verður størri og breiðari úrvæl innihaldsliga**

ÚTVARPSVERTUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*
*Mynd; Álvur Haraldsen*

Eftir at Janus Mohr legði frá sær fyri aldur í starvinum í ÚF, eftir í mong ár m.a. at hava verið vertur í sunnudagssendingini Føroyskir Sangir, hevur Zacharias Sørensen sett seg í stólin sum vertur í sendingini.

Sendingin byrjaði í oktober í 1983, upplýsir Janus Mohr, og Janus gjørdi 1063 sendingar. Øll handritini eru til taks, eins og Janus gjørdi sær savn við sonevndum stikkorðum, so hann visti nær hann hevði prátað um tey ymsu evnini, so vandi ikki gjørdist fyri ov mongum endurtøkum.

Vit hava hitt nýggja vertin, fyri at fáa sett andlit á røddina og fyri at frætta, um broytingar eru væntandi, tí smávegis broytingar eru longu at hóma, nú nýggjur maður er komin í sessin.

– Leisturin er hansara, sigur Zacharias Sørensen, og sipar til Janus Mohr.

– Hann hevur havt sendingina í mong ár og hetta skal vera framhald av hesum. Men eg leggi meg eftir at hava størri úrvæl og at víðka innihaldið. Eisini royni eg at fáa nakað av tí nýggja við, sigur Zacharias Sørensen.

## Sangbært

– Eg havi sett mær fyri at koma nógv út í krókarnar, so at skilja, at eg royni at fáa tað við, ið ikki verður nógv spælt. At fáa tað við, ið er sangbært, men sjáldan spælt, sigur nýggi verturin.

– Eg haldi fram við at hava tað gamla við, men eisini nýtt. Tað hevur týdning at hava tað sangsøguliga við og hetta hevur eisini mín áhuga. Vit síggja eisini, at bólkar og sangarar leita aftureftir í størri og størri mun, sigur Zacharias, sum sigur meginregluna vera, at tað sum spælt verður, skal vera sangbært.

– Eg skilji sendingina sum stuðlan av okkara felagssangmentan, sigur Zacharias.

Sum nakað nýtt hava norðurlendskir tjóðsangir verið at hoyra í sendingini.

– Teir eiga pláss og teir standa í Sangbók Føroya Fólks. Føroyskir sangir eru eisini í familju við aðrar norðurlendskar sangir, metir Zacharias Sørensen.

## Upptøkur

– Ein stórur partur í øllum hesum er at gera nýggjar upptøkur. T.d. ætlaði eg at hava ein sang úr Føroya Fólks um Ólav Trygvason við í sendingini nú sunnudagin. Men sangurin fanst ikki í savninum. Jú, her manglar nógv enn, hóast Janus Mohr hevur gjørt eitt sera stórt arbeiði á hesum økinum, sigur Zacharias Sørensen.

Hann ivaðist ikki, tá hann varð spurdur um at taka við, tá Janus fór.

– Hetta er bundið, tí tað er ein sending hvørja viku. Og eg havi annað arbeiði, so hetta er frammíhjá. Men eg haldi hetta er meiningsfult arbeiði og eg vil fegin vera við til at menna felagssangin í Føroyum.

– Sangur er okkara okkara tónleikaliga rávøra og smittar á alt hitt. Men sangurin er eisini í vanda við altjóðagerð og øllum, ið kemur inn á okkum. Útboðið veksur. Fólk gerast minni virkin og alt meir eygleiðarar ella áhoyrarar, metir Zacharias.

– Føroyingar syngja meira, enn gjørt verður aðrastaðni, og tað eiga vit at halda fast við. Og tað er ein søgulig frágreiðing: vit hava so longi bara havt sang og ongi ljóðføri. Hví vit so seint hava fingið ljóðføri, er ilt at siga. Víkingar kendu ikki nógv til ljóðføri og ljóðføri hava søguliga ofta verið hjá teim ríku. Men føroyingar hava søguliga og kirkjusøguliga sungið nógv og verið virknir, greiðir Zacharias frá.

– Tað hevur verið ein dygd at syngja. Øll vilja kanska ikki kennast við tað, men tað bleiv kappsungið í kirkjuni. Nógv varð hildið um tey, ið dugdu at syngja og dugdu nógvar sangir, sigur Zacharias Sørensen.

## Andsøgnin

Hann metir, at ÚF, ella Kringvarpið, so avgjørt hevur ein leiklut í útbreiðsluni av løgum og sangum.

– Men útvarp hevur eisini standardiserað sangin og hevur sostatt bæði breitt sangin út og gjørt hann meira stirvnan, heldur Zacharias.

– At spæla felagssang fyri fólki, ið bert situr og lurtar, er kanska ein andsøgn, men hinvegin kann hetta læra fólk sangirnar. Men í sær sjálvum er tað ein andsøgn, at fólk lurtar eftir felagssangi. Tað spennandi er, um miðlarnir kundu blivið meira interaktivir á hesum økinum eisini í framtíðini, sigur Zacharias Sørensen.

## FAKTA

**Zacharias Sørensen**
56 ár
Lærari í tónleiki í Studentaskúlanum í Hoydølum
Prógv sum cand mag frá lærda háskúlanum í Århus í 1984 við tónleiki sum høvuðsgrein og myndlist sum hjágrein. Byrjaði at undirvísa í Hoydølum í 1982.
Gav út Sálmaløg Føroya Kirkju í 2000 saman við Knút Olsen.
Givið út á egnum forlag Løg til Sangbók Føroya Fólks, 2003.
Er virkin í Føroya Sanglærarafelag.
Stovnaði Rútmiska Kórið í Hoydølum og er leiðari tess enn.

## Heilsusøgan út í bók

Bókin *Kunnskap og makt* lýsir hugburðin í føroyskum heilsupolitikki frá fyrst í 19. øld og fram til heimastýristíðina. Sambandið millum kunnskap og makt er knýtt at hugsunarhátti heldur enn persónum. Viðgerðin byggir millum annað á greinir og frágreiðingar, sum læknar hava skrivað um føroysk heilsuviðurskifti í læknatíðarritum og fyri donsku heilsumyndugleikarnar. Hugsan teirra um, hvørji tiltøk áttu at verðið sett í verk, ber dám av læknafrøðiligu vitanini í samtíðini. Eitt nú fór tann nýggja læran um bakteriur seinast í 19. øld at seta reinføri í miðdepilin. Men frágreiðingarnar hjá læknunum vísa, at ikki bara læknafrøði stýra frásjón og fatan hjá serfrøðingum.

Ymiskir tættir í føroyskari heilsupolitiskari søgu verða lýstir, teirra millum framvøksturin av kommunlæknaskipanini og av sjúkrakassum.

Bókin hevur 13 kapittul:
1 . kap.: Ástøði
2: kap.: Føroya søga
3.-4. kap.: I. skeið: Skráseting av heilsustøðuni í danska ríkinum
5.-8. kap.: II. skeið: Liberalisma undir umsorgan og eftirliti ríkisins
9.-12. kap: III. skeið: Føroyskt sjálvræði og/ella atgongd til ágóðar í danska vælferðarríkinum
13. kap.: Luttakarar og áskoðarar í føroyskum heilsupolitikki
Fylgiskjøl: Skrá yvir allar kommunulæknar fram til 1950

Fróðskapur gevur bókina út. Hon er 446 s. og hevur 36 fotomyndir umframt strikumyndir, talvur og tekstmyndir. Ingi Joensen hevur gjørt permumyndina, og bókin er prentað á Føroyaprent. Útgávan er stuðlað av Vísindagrunni Føroya Sparikassa, av Grunni Onnu Djurhuusar til áminnis Sverra Fon og av Universitetinum í Bergen.